## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og stundum regn ella vátaslettingur. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið, partvís vátaslettingur. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi, um kvøldið lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 1 og 4 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Sunnudagin minni vindur av suðri og ælingur. Hitin millum 4 og 8 stig.

Christmas Child:

# Heimsins størsta jólatiltak fyri børn

**Sunnudagin 26. oktober var seinasti dagur at lata inn skógvaeskjur við gávum til neystødd børn. Sunnudagsskúlin í samkomuni, Lívdini, í Hoyvíkar Skúla, hevur skipað fyri tiltakinum í samstarvi við felagsskapin Samaritan´s Purse**

GÁVUR

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Seinastu 23 árini hevur Franklin Graham, sonur navnframa Billy Graham, stjórna vælgerandi felagsskapinum Samaritan´s Purse, har eitt av tiltøkunum er Christmas Child.

Endamálið við Christmas Child er at vísa líðandi børnum sonnu orsøkina til at halda jól, nevniliga at minnast Guds størstu gávu til menniskjuni - Jesus Kritsus.

Tiltakið Christmas Child sendir ein boðskap um vón til neyðstødd børn kring allan heim við at geva gleðiboðskapin og skógvaeskjur fullar av gávum.

Her í Føroyum var tað sunnudagsskúlin í samkomuni, Lívdin, í Hoyvíkar Skúla, sum stóð fyri innsavningini av skógvaeskjunum.

Børnini kundu lata so nógvar skógvaeskjur, sum tey vildu, men tey kundu eisini vera fleiri um eina eskju. Skógvaeskjur komu eisini aðrastaðni frá í landinum. Tilsamans komu umleið 250 eskjur inn.

Gávurnar í eskjunum skuldu ikki vera brúktir, men nýggir lutir, tað kundi vera t.d. smáir bóltar, bamsur, pennar litblýantar, teknibøkur, tyggigummi, tannbustir og tannkrem. Børnini kundu eisini leggja eina heilsan við í eskjuna saman við eini mynd. Í hesum sunnudagsskúlanum ganga umleið 100 børn í fýra flokkunum. 25 fólk eru knýtt at sunnudagsskúlanum, sum er hvønn sunnudag frá 12–13.15 í Hoyvíkar Skúla.

Frá sunnudagsskúlanum takka tey hjartaliga øllum, sum hava stuðla tiltakinum við gávum og peningi, og tey eru takksom fyri at vit í Føroyum á hendan hátt kunnu verða við til at náa børn úti í heimi við umsorgan og gleðiboðskapinum.

Skógvaeskjurnar verða sendar við skipi úr Føroyum til Onglands, har Samaritan´s Purse hevur goymslubygningar, sum taka ímóti skógvaeskjunum.

Eimskip í Føroyum stuðlar tiltakinum við at fíggja flutningin úr Føroyum.

Í 2002 vórðu sjey milliónir skógvaeskjur latnar líðandi børnum í umleið 100 londum.




*Umleið 250 skógvaeskjur við gávum komu inn í sambandi við Christmas Child tiltakið*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 0 |
| Nuuk | 1 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | 13 |
| Halifax | 14 |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 9 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 10 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 8 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | 5 |
| Moskva | ÷4 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | 3 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 3 |
| Paris | 5 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 16 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 17 |
| Malta | 24 |
| Tunis | 23 |
| Beijing | 17 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | – |
| New York | 17 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 28 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 25 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 20 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, 952 hPa. við Lofoten fer eystureftir og kuldabrúgvin haðani til Hetlands fer í landsynning. Eitt annað lágtrýst, 985 hPa. við Ísland fer í landsynning og verður sunnan fyri Føroyar mikudagin.




Lágtrýstið sunnan fyri Føroyar fer í landsynning og hevur eitt skifti høgætt við eitt sindur kaldari veður við sær.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 27/10 kl. 06⁰⁰– 28/10 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,7°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,8 mm – mált frá 27/10 kl. 06⁰⁰–28/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 54,6 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

25. oktober: Tendring
26. oktober: Mánin næstur jørðini
1. november: Fyrra kvarter

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 29. okt | 09.30 | 22.01 | 08.30 | 21.01 | 08.45 | 21.16 | 11.30 | — | 00.00 | 12.30 | 07.45 | 20.16 | 06.45 | 19.16 | 09.45 | 22.16 | 10.45 | 23.16 | 09.15 | 21.46 | 10.30 | 23.01 |
| 30. okt | 10.30 | 23.00 | 09.30 | 22.00 | 09.45 | 22.15 | 00.01 | 12.30 | 01.01 | 13.30 | 08.45 | 21.15 | 07.45 | 20.15 | 10.45 | 23.15 | 11.45 | — | 10.15 | 22.45 | 11.30 | — |
| 31. okt | 11.28 | 23.57 | 10.28 | 22.57 | 10.43 | 23.12 | 01.00 | 13.28 | 02.00 | 14.28 | 09.43 | 22.12 | 08.43 | 21.12 | 11.43 | — | 00.15 | 12.43 | 11.13 | 23.42 | 00.00 | 12.28 |
| 1. nov | — | 12.36 | 11.36 | — | 11.51 | — | 01.57 | 14.36 | 02.57 | 15.36 | 10.51 | 23.31 | 09.51 | 22.31 | 00.12 | 12.51 | 01.12 | 13.51 | — | 12.21 | 00.57 | 13.36 |

Kelda. Álmanakkin 2003

5 707265 100036 >